# Tað er strævið á Hafnia

STARVSVENJING
*Vár Gaard, praktikantur*

Mánadagin fóru eg og myndamaðurin, Jens Kristian, okkum ein túr inn á tað hugnaliga Hotel Hafnia. Har hittu vit tvær gentur Maibritt og Maud, tær eru í stravsvenjing á Hotel Hafnia. Tær eru ávíkavist frá Oyndarfirði og Skála, og ganga báðar í 10 flokki á Stranda skúla.

Áðrenn vit byrjaðu at práta, tók myndamaðurin eina mynd av hesum fittu gentum. Síðani settu vit okkum í eina sofu, at fáa okkum eitt lítið prát. Eg spurdi tær nakrar spurningar um hvussu tað er at verða í starvsvenjing á Hafnia.

– Her er gott at verða, fyrsta dagin var tað ógvuliga strævið, í hvussu er í køkinum sigur Maud við einum stórum suffi á andlitinum, skrellaði eplir, gularøtur, og leyk í hópa tali, upp í heilar sekkir.

– Tað var eisini ógvuliga strævið tann fyrsta dagin at servera, tí man stendur uppi allatíðina, gongur runt, tekur dúkar av, leggur dúkar á og so víðari, tað var ikki bara strævið tann fyrsta dagin, men eisini allar hinar dagarnar" sigur Maibritt.

– Fólkini eru fitt at arbeiða saman við, kanska eitt sindur strang av og á" siga tær báðar tvær. Starvsvenjingin er í tvær vikur, ta fyrru vikuna hevur Maibritt serverað, og Maud verið í køkinum, og ta næstu vikuna skulu tær skifta um.

Tær búgva báðar í Havn meðan tær eru í starvsvenjing, tí tær byrja tíðliga um morgunin, í køkinum byrja tey kl. 09.00 og arbeiða líka til kl. 17.00, og tey sum servera byrja kl. 08.00 og arbeiða til kl. 16.00, so tað fer ein heilur dagur við at arbeiða. So tær fáa seg rættuliga royndan.



*Maibritt og Maud eru í starvsvenjing á Hotel Hafnia. Tær eru ávíkavist frá Oyndafirði og Skála, og ganga báðar í 10. flokki á Stranda skúla.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# MBF heldur føðingardag í Suðuroy

BREKAÐ
*Vár Gaard, praktikantur*

Í samband við at MBF fylti 20 ár 24. oktober í fjør, varð stórt føðingardagstiltak í Norðurlandahúsinum. Tá varð avgjørt at tiltakið eisini skuldi haldast í Suðuroy, tað tiltaki verður nú hildi í gistingarhúsinum í Øravík, tann 13. apríl 2002.

Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum (MBF), varð stovnað ST-dagin 24. oktober 1981. Tað vil við øðrum orðum siga at felagið hevði 20 ár á bakið í fjør heyst. Áðrenn MBF varð stovnað, vóru tað 6 feløg fyri brekað í Føroyum. Hesi feløgini valdu at sláa seg saman í ein arbeiðsbólk, ið tey kalla MBF. Í dag eru 22 feløg í MBF.

Undirhald verður fyri trimum flokkunum í Suðuroy ið hava tekna seg til. Maria Andersen og Edny Poulsen undirhalda við sangi og teknum. Bárður Enni luttekur eisini. Eisini verður greitt frá um ítrótt fyri brekað, og næmingarnir fáa høvi at royna onkra ítróttagrein.

MBM bjóðar TOP POP og FÓM bjóðar ÍS.

Ein framsýining verður eisini ið vísir, hvat feløgini í MBF standa fyri, hvørji tey eru, og hvat tey kunnu brúkast til. Harumframt eru eisini básar í m.a vísa ljóðbøkur o.a, MBF vísir eisini fram ymiskt tilfar.

Har verða eisini tríggir ymiskir fyrilestrar fyri almenninginum, um t.d: Psyku og Rørslu. Hvat kann fáast á hjálpartólarmiðstøðini. Heilivágur nú og í framtíðini.

Birthe og Regin Havn Rasmussen fara eisini at spæla Harmoniku.



*Í samband við at MBF fylti 20 ár 24. oktober í fjør, varð stórt føðingardagstiltak í Norðurlandahúsinum. Tá varð avgjørt at tiltakið eisini skuldi haldast í Suðuroy*

*Savnsmynd*






Búskapur og vinna:

## Kvotan liðug

Norsku útróðrarmenninir eru í øðini, tí fiskivinnumyndugleikarnir hava givið teimum boð um at gevast við útróðrinum sunnukvøldið.

Eins og í Føroyum er tey smærri fiskiførini í Noregi býtt sundur í bólkar, og teir smáu útróðrarbátarnir eru í bólki II. Í hesum bólkinum eru ikki færri enn 5000 bátar, og toskakvotan hjá teimum er góð 13.000 tons. Í vetur varð avgjørt, at 5.000 av teimum 13.000 tonsunum skulu goymast til aftan á 1. mai, og sambært fiskivinnumyndugleikunum hava bátarnir longu fiskað hini 8.000 tonsini. Tí noyðast bátarnir at gevast nú sunnukvøldið, og teir sleppa so ikki útaftur fyrr enn 1. mai. Í fjør sluppu útróðrarbatarnir at halda fram, men tá var úrslitið, at øll toskakvotan var liðug tann 13. mai.

Talsmenn hjá norsku útróðrarmonnunum ilskast um, at teirra partur av heildarkvotuni er ov lítil. Upprunaliga áttu bátarnir 14 prosent av heildarkvotuni, men nú er parturin bara sjey prosent. Útróðrarmenninir vilja vera við, at politikararnir áttu heldur at tikið frá teimum stóru skipunum. Fleiri fiskavirkir taka undir við hesum, tí útróðrarfiskurin er betri enn fiskurin frá teimum stóru skipunum, siga tey.

## 42 til hús

Leiðslan á danska blaðnum BT hevur gjørt av at siga 42 fólk úr starvi. Avgerðin fær serliga ávirkan á tíðindadeildina, har sætti hvør noyðist at leita sær eftir øðrum arbeiði.

Hetta er triðju ferð í tvey ár, at BT koyrir fólk til hús, og Kristian Lund, ábyrgdarblaðstjóri harmast um uppsagnirnar. Hann vísir á, at BT skal spara 34 milliónir krónur fyri at fáa avlop í roknskapinum næsta ár, og tí eru uppsagnirnar neyðugar, sigur hann. Í fjør gav raksturin 40 milliónir krónur í halli.

UTTAN ÚR HEIMI

# Týskland hevur steðgað vápnasøluni til Ísrael



*Ísrael hevur tørv á herútgerð og eykalutum til stríðsvognarnar, men týska stjórnin hevur sett landsins fyrutøkum forboð fyri at selja ísraelska herinum útgerð.*

**Týska stjórnin hevur teir seinastu mánaðarnar sýtt fyri at lata týskar fyritøkur selja Ísrael vápn.**

TÝSKLAND
*Árni Joensen:*

Myndugleikarnir í Berlin hava ikki grett eitt orð um avgerðina, men ísraelska verjumálaráðið váttar fyri blaðnum Financial Times Deutschland, at Týskland hevur steðgað vápnasøluni hagar.

Sambært blaðnum hava myndugleikarnir sýtt týskum fyritøkum útflutningsloyvi, tá talan hevur verið um hernaðarútgerð ella eykalutir til Ísraels. Talan hevur m. a. verið um vápn, hernaðarakfør ella ymsar lutir, sum hava við herútgerð at gera.

Financial Times Deutschland sigur seg hava fingið at vita, at ísraelsmenn hava biðið um eykalutir til stríðsvognarnar av sløgunum Merkava-3 og Merkava-4, sum verða hildnir at vera teir bestu í heiminum. Ísraelski herurin hevur nógvar stríðsvognar av hesum slagnum, og fleiri teirra hava verið at sæð í teimum palestinsku býunum á Vestara Áarbakka seinastu dagarnar, men har hevur tað víst seg, at teir vápnaðu palestinararnir vóru førir fyri at oyðileggja tveir teirra. Hetta hevur sambært blaðnum skelkað ísraelska herin, sum helt, at einki kundi steðga stríðsvognunum av hesum slagnum.

Talskvinnan hjá ísraelska verjumálaráðnum, Rachel Naibik-Aschkenazi, sigur við týska blaðið, at ísraelska stjórnin hevur spurt týska uttanríkisráðharran, Joschka Fischer, hví vápnahandilin er steðgaður, men hevur ikki fingið svar.

Sambært talskvinnuni uppfatar ísraelska stjórnin hetta sum eina týska roynd at gera enda á tí higartil góða hernaðarliga samstarvinum millum Týskland og Ísrael. Hetta samband hevur í mong ár verið mett sum eitt slag av einum týskum endurgjaldi fyri tað, sum hendi undir seinna heimsbardaga.

# Irak trýstir oljuprísin upp

**Avgerðin hjá Irak at skrúva oljukranarnar fyri hevur fingið OPEC-londini at tosa um kreppufund. Ímeðan hækkar oljuprísurin nógv.**

OLJUMARKNAÐUR
*Árni Joensen*

Mánadagin stongdi Irak oljuleiðingina til turkiska havnarbýin Ceyhan, eftir at Saddam Hussein, forseti hevði boðað frá, at Irak fer at steðga sínum oljuútflutningi í 30 dagar fyri at trýsta USA til at noyða Ísrael at taka seg aftur úr teimum palestinsku økjunum.

Á altjóða oljumarknaðinum eru menn farnir at gita, um Iran og Libya fara at taka sama stig sum Irak. Andaligi leiðarin í Iran, ayatollah Ali Khaminei, hevur sagt, at tann styðjar iraksku avgerðina, men enn er ikki greitt, um tað merkir, at Iran fer at gera tað sama sum Irak.

Í seinastuni hevur Irak útflutt umleið tvær milliónir tunnur av olju um dagin. Tað svarar til umleið fýra prosent av heimshandlinum.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Irak hevur skrúvað kranarnar fyri. Saddam Hussein hevur fleiri ferðir skert iraksku oljuframleiðsluna, tá hann hevur verið misnøgdur við onkra avgerð hjá ST. Hesaferð nýtir hann oljuna sum politiskt vápn ímóti Ísrael og USA.

Ein talsmaður hjá OPEC-felagsskapinum segði mánakvøldið, at londini hava ongar ætlanir um at broyta verandi oljuframleiðslu, men irakska avgerðin hevði kortini so mikið stóra ávirkan, at leiðslan í OPEC gjørdi av at halda kreppufund ígjøgnum telefonina. Nær hann verður, er ikki greitt.

### Prísurin upp

Serfrøðingar á altjóða oljumarknaðinum siga, at ófriðurin í Miðeystri og amerikanska hóttanin um álop á Irak gera, at oljuprísurin er einar fimm dollarar oman fyri tað, hann annars hevði verið. Tá marknaðirnir lótu aftur seinasta fríggjadag, var prísurin á norðsjóvaroljuni 26 dollarar fyri tunnuna, men eftir iraksku avgerðina fór hann upp á 27,3 dollarar mánadagin.

Summir serfrøðingar halda, at OPEC-londini kunnu økja sína framleiðslu so mikið, at tað kann avmarka príshækkingina, sum stendst av irakska steðginum. Men aðrir ivast í hesum. Teir vísa á, at tað eru bara Saudiarabia og Kuwait, sum hava nakað av tøkari framleiðsluorku, men at tað fer at taka tíð, áðrenn tey bæði londini kunnu økja framleiðsluna tvær milliónir tunnur um dagin.

Ímeðan hækkar oljuprísurin.

Úr Norðurlondum:

## Í Hægstarætt

Øll tey fýra, sum herfyri vórðu dømd langar fongsulsrevsingar í tí sonevnda Orderudmálinum í Noregi, hava gjørt av at skjóta dómin hjá Eidsivating-rættinum inn fyri Hægstarætt. Í undirrættinum fingu tvey av teimum ákærdu 21 ára fongsul, sum er harðasta fongsulsrevsing í Noregi.

Sakførararnir hjá teimum dømdu umhugsa nú, um teir skulu kæra mannagongdina í rættarmálinum umframt sjálva revsingina. Skuldi tað hent, at Hægstirættur gevur teimum viðhald í, at mannagongdin hevur ikki verið røtt, verður dómurin í undirrættinum settur úr gildi, og rættarmálið skal so ganga umaftur.

## Fer ongan veg

Danski fíggjarmálaráðharrin, Thor Pedersen, noyddist í gjár at vissa tey eldru í Danmark um, at fólkapensjónin verður verandi í gildi. Hetta helt ráðharrin vera neyðugt, eftir at ungdómsfelagsskapirnir hjá trimum av teimum politisku flokkunum høvdu mælt til at taka fólkapensjónina av og at nýta privata uppsparing ístaðin.

Thor Pedersen segði í gjár, at fólk, sum ígjøgnum eitt langt lív hava tænt danska samfelagnum, skulu fáa fólkapensjón, og hann gjørdi greitt, at sitandi stjórnin hevur ongar ætlanir um at broyta hetta.

## Vend í

Líkt er til, at tann drúgva vend nú er komin í ta drúgvu afturgongdina hjá norska Arbeiðaraflokkinum. Í einari kanning í mars fekk flokkurin niðan fyri 15 prosent av atkvøðunum, men nú vísir ein kanning, at 19,5 prosent siga seg stuðla flokkin.

Parlamentariski leiðarin hjá flokkinum, Jens Stoltenberg, vónar, at nýggja kanningin er eitt tekin um, at tað nú fer at ganga hinvegin.